


Í ár hava limirnir í Starvsmannafelagnum staðið saman og virkað í fólksins tænastu í fimmti ár.
Kvinnur og menn. Tey eru skansar í gerandisdegnum og hjálpa til at bera samfelagið fram á mál.
Hetta er tað, tey gera. Fleiri enn 2.000 í tali. Tey gera munin.

… í fólksins tænastu

Innflutningur | Skipaavgreiðsla | Faroe Express | Frystigoymsla
Útflutningur | Innlendiskoyring | Vøruhotell | Oljuútgerðarhavn

# Leiðari til Faroe Express søkist

## *- Eitt spennandi starv við stórum avbjóðingum*

- **Starvið**
  Talan er um eitt spennandi og avbjóðandi starv í eini altjóða flutningsfyritøku, har tú hevur ábyrgd av menning og sølu av loysnum okkara. Faroe Express er partur av Innflutningsdeildini hjá Faroe Ship. Í løtuni starvast 6 fólk hjá Faroe Express.

- **Førleikakrøv**
  Tær dámar praktisk arbeiði, ert fyrikomandi og áheitin, arbeiðir bæði sjálvstøðugt og saman við øðrum, og tú skrivar og talar føroyskt, skandinaviskt og enskt. Grundvirðir felagsins eru: avrik, samstarv og álit. Tað er avgjørt ein fyrimunur, um tú hevur viðkomandi útbúgving og starvsroyndir, men hetta er ikki ein treyt.

- **Lønarviðurskifti og umsókn**
  Lønin verður ásett í samsvari við førleikar og royndir. Umsókn við møguligum prógvum og skjølum um starvsroyndir skulu sendast til Faroe Ship, Eystara Bryggja, Postboks 47, FO-110 Tórshavn í seinasta lagi 27. apríl 2011. Hevur tú okkurt at spyrja um í sambandi við starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Rene Dahl Olesen, Fartel. 549010, renedo@faroeship.fo.

FAROE SHIP

Faroe Express er deild undir Faroe Ship. Virkisøkið hjá Faroe Ship er innflutningur, útflutningur, innlendiskoyring, agency/skipaumboðan, vøru- og frystigoymslur og skundflutningstænastan Faroe Express v.m. Við uml. 100 góðum starvsfólkum arbeiða vit áhaldandi við at menna okkara tænastur og tillaga okkum til tørvin hjá viðskiftafólkunum. Faroe Ship ynskir at verða ein viðleikari til at menna og fremja føroyskt vinnulív og harvið Føroyar.